

# Íbúðir undir Gráasteini
# 20 milliónir í halli

## Árið 2013 royndist einki serligt hjá kreppurakta felagnum, sum bygdi íbúðirnar undir Gráasteini í Havn

Felagið sigur í ársfrágreiðingini, at úrslitið er ávirkað av, at lánistovnurin hevur eftirgivið skuld upp á 30,3 milliónir krónur.

Somuleiðis ávirkaði tað úrslitið í 2012, at lánistovnur felagsins eftirgav skuld upp á 100 milliónir krónur. Tá gjørdist úrslitið eitt yvirskot upp á góðar 84 milliónir krónur.

Tað er BankNordik, sum varðar av felagnum, eftir at upprunaliga felagið fór á húsagang, langt áðrenn byggiarbeiðið var liðugt.

Leiðsla felagsins sigur seg ikki vera nøgda við úrslitið.

Eftir at roknskaparárið endaði við ársskiftið hevur felagið selt tveir av íbúðarblokkunum til Bústaðir. Tað var í januar, at Bústaðir keyptu 24 íbúðir frá Íbúðum undir Gráasteini fyri 38,4 milliónir krónur.

– Keypið ger, at vit kunnu framskunda okkara útboð av leigubústøðum í høvuðsstaðarøkinum, og møta stóra eftirspurninginum, segði Andras Róin, stjóri á Bústøðum, tann 14. januar.

Sp/F íbúðir undir Gráasteini sigur í ársfrágreiðingini um framtíðina, at felagið hevur staðið fyri bygging av 96 íbúðum. Byggingin verður liðug í 2014, og felagið er farið undir at selja íbúðirnar, men enn er óvist, nær allar íbúðirnar verða seldar. Virksemi felagsins í komandi tíðum verður at fáa selt íbúðirnar.

Felagið ger eisini greitt, at felagið hevur fingið játtað neyðuga fígging til dagliga raksturin tað komandi árið.

Partapeningurin í felagnum er 125.000 krónur, men av tí at felagið hevur havt støðugt hall, so er eginognin negativ við næstan 62 milliónum krónum, hóast felagið hevur fingið eftirgivið 130 milliónir krónur í skuld seinastu tvey roknskaparárini. Skuldin til pengingastovnar er 115 milliónir krónur.

Stjóri í Íbúðum undir Gráasteini er Christian Andreasen, advokatur.

## MÁNADAGIN

7/10 °C



5-10 m/s 9-14 m/s

**Seinnapart:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av norði, um kvøldið minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 7 og 10 stig.

## TÝSDAGIN

7/10 °C



5-10 m/s 7-12 m/s

Andøvsgul upp í ein strúk av norði, seinnapartin minni vindur av útnyrðingi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 7 og 10 stig.

## MIKUDAGIN

7/10 °C



3-8 m/s 3-8 m/s

Lot til andøvsgul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið hósdagin og fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Veðrið mánanáttina:**
Eitt lágtrýst, 990 hPa. yvir Suður-Noregi fer í landsynning.




**Veðrið týsnáttina:**
Lágtrýstið yvir Skagerrak fer í landnyrðing og ein veikur hátrýstryggur yvir Íslandi stendur mestsum í stað.

## HITALAG
*fyri august*




Miðal 1961-1990: 10,5°C

## AVFALL
*fyri august*




Miðal 1961-1990: 83 mm

## AVFALL 2014






**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

10/8: Mánin næstur jørðini
17/8: Seinna kvarter
24/8: Mánin longst frá jørðini
25/8:Tendring

Kelda. Álmanakkin 2014

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 18. aug | 01:54 | 14:33 | 00:54 | 13:33 | 01:09 | 13:48 | 03:54 | 16:33 | 04:54 | 17:33 | 00:09 | 12:48 | 11:48 | - | 02:09 | 14:48 | 03:09 | 15:48 | 01:39 | 14:18 | 02:54 | 15:33 |
| 19. aug | 02:57 | 15:21 | 01:57 | 14:21 | 02:12 | 14:36 | 04:57 | 17:21 | 05:57 | 18:21 | 01:12 | 13:36 | 00:12 | 12:36 | 03:12 | 15:36 | 04:12 | 16:36 | 02:42 | 15:06 | 03:57 | 16:21 |
| 20. aug | 03:44 | 16:08 | 02:44 | 15:08 | 02:59 | 15:23 | 05:44 | 18:08 | 06:44 | 19:08 | 01:59 | 14:23 | 00:59 | 13:23 | 03:59 | 16:23 | 04:59 | 17:23 | 03:29 | 15:53 | 04:44 | 17:08 |
| 21. aug | 04:30 | 16:53 | 03:30 | 15:53 | 03:45 | 16:08 | 06:30 | 18:53 | 07:30 | 19:53 | 02:45 | 15:08 | 01:45 | 14:08 | 04:45 | 17:08 | 05:45 | 18:08 | 04:15 | 16:38 | 05:30 | 17:53 |
| 22. aug | 05:15 | 17:37 | 04:15 | 16:37 | 04:30 | 16:52 | 07:15 | 19:37 | 08:15 | 20:37 | 03:30 | 15:52 | 02:30 | 14:52 | 05:30 | 17:52 | 06:30 | 18:52 | 05:00 | 17:22 | 06:15 | 18:37 |